# ALMANNASTOVAN

## Málsviðgeri á Veitingardeildini

**Eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri á Veitingardeildini er leyst at seta til 1. februar 2004.**

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki:**
- Pensiónsmál – útrokning, áseting og ávísing
- Dagpeningamál – viðgerð, avgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Uppihaldspeningur – viðgerð, útrokning, áseting og ávísing
- Forsorgarmál – útrokning og ávísing av málum játtað í Almannamiðstøðini, Streymoy, Barnaforsorgar- og Brektoyminum Arbeiðsmarknaðardeildini
- Gera upp fíggjarliga partin, tá mál ganga út
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving:**
- Skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- Starvsfólkið skal luttaka á innanhýsis útbúgving hjá Almannastovuni

**Arbeiðsroyndir/førleikakrøv:**
- Arbeiðsroyndir innan almenna umsiting ella líknandi starvsroyndir er ein fyrimunur
- Er fleksibul og hevur góð samarbeiðsevnir
- Evni og vilja til at arbeiða saman við øðrum toymum og miðstøðum
- Evni at hava yvirlit við at kunna arbeiða við fleiri kompleksum problem-stillingum í senn
- Hava góð evni til at kunna umstilla seg tá broytingar henda
- Góð evni at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- Hollan kunnleika til EDV – her er tað ein fyrimunur at hava hollan kunnleika til Windows office programmini

**Um deildina:**
Á deildini starvast 11 málsviðgerar, 3 fulltrúar og 1 deildarleiðari. Av tí at talan er um nýggjan bygnað á Almannastovuni, má tann ið sett/-ur verður tola broytingar í starvsinnihaldinum.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarbólki 3. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðara á tlf. 35 35 10.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til

**Almannastovuna**
J. Broncksgøta 27
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

í seinasta lagi **mánadagin 26. januar 2004.**
Vinarliga merkið brævbjálvan: »Veitingardeildin«.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið í Maritargøtu Í Hoyvík**

Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 16 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Stovnurin kann tó umskipast alt eftir um tørvur er á vøggustovu ella barnagarðsplássum

www.torshavn.fo

## Leiðari til nýggja Býlingshúsið í Maritugøtu í Hoyvík

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Býlingshúsið í Maritugøtu í Hoyvík, sum eftir ætlan letur upp í august mánaði 2004.

**Vit ynskja at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur teldukunnleika
- ert opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum innan økið
- sært møguleikar framum forðingar

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. februar 2004.

# Tofta kvøldskúli

## Veturin 2003/2004

**Almenn frítíðarundirvísing**
**Datalæra**, tekstviðgerð á byrjanarstigi

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | kl. 19.00-21.35 | Ragnar Joensen | Tlf. 219841 |

**Heilsa og kostur – og hvussu nýta vit føroyskar urtir í matgerð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudag | kl. 18.00-21.00 | Olga Hentze | Tlf. 224258 |

Undirvísingin er treytað av nóg góðari undirtøku og av góðkenning frá myndugleikunum.

Byrjað verður í viku 4 og endar í viku 13.
Datalæra kostar 50,- kr. eyka fyri prenting og pappír.
Goldið verður tað fyrsta kvøldið.

Upplýsingar fáast frá kvøldskúlaleiðaranum tlf. 447332.

**Tofta kvøldskúli**




XA
FÓLKAFLOKKURIN
- Ábyrgd, álit og áræði.
Turid Christophersen



Minst til haldaragjaldið...!



Sosialurin
Argjaivegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo







# Bilar til sølu

**Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler 5 setur**



prísur 148.000,-

Gráur metalllakk · Árgang 1999 · Km. 95.000 · 5 setur
Aircondition · Altimetur · El-spegl · El-rútar framman
Hita í setrum · Tokulyktir · Lættmetalfelgur við heilársdekkum
Summardekk fylgja við · Vælhildin

**Mercedes CLK 320 Avantgarde aut. bensin**



Árgang 2001 · Km. 20.000 · Automat gear tiptronic · 4 setur
Gráur mettallakk · Klimaanlegg · Grá leðursetur við hita
Multifunktiónsróður · Parkeringssensorar · Mercedes anlegg
við fleiri diskum · 6 stk Bose hátalarar · innbygda telefon
og nógv annað. Nýprísur kr. 850.000,-
Til sølu um hóskandi boð fæst.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

veitst tú ikki tað?

# Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

  Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2004.

  Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

  Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

  Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

  Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

  Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

  Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

  Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 8. januar 2004
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA
Kongabrúgvin · P.O.Box 329 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel+298 345600 · Fax+298 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd

Útskiftingarfundur verður í Kunoy mikudagin 28. janaur kl. 11.

Á fundinum verða metingin av kommunalu ognartøkuni og endaligur planur fyri útskiftingina løgd fram.

Ætlanin er at enda útskiftingina og lata hana til ákæru.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

# Pedagogur søkist

Vit eru 80 glað og lívlig børn og ein væl samansjóðaður starvsfólkabólkur, ið frá uml. 1. mars 2004, mangla ein pedagog 32 tímar um vikuna, í okkara hópi.

Ljóðar hetta áhugavert???

– So støkk inn á gólvið ella ring á tlf. 312854 og tosa við Louisu.

Skrivlig umsókn við avriti verður at senda í seinasta lagi 9. februar.

**Sankta Jósefs Barnagarður**
Varðagøta 12 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 312854 · Fax 316990